## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# SKOMM UM SEMJAN STØKKUR

Tað var altíð væntandi, at kuril fór at koma á tráðin í málinum um stjórnarskipanina. Soleiðis er føroyskur politikkur. Seinastu fleiri enn 100 árini hava vit togast um hesi viðurskifti - og viðhvørt tykist, at summir politikarar halda, at soleiðis eigur tað bara at vera.

Løgtingið fór í gjár undir viðgerðina av hesum góða uppskoti, sum hevur verið ávegis seinastu 12 árini.

Tað boðaði frá góðum, tá umboð úr øllum flokkum løgdu fram álitið um stjórnarskipanaruppskotið. Men tað vísti seg skjótt, at full semja ikki var í øllum flokkum, og tað gav at bíta, tá løgmaður á ríkisfundi í Skagen boðaði frá, at uppskotið var burturdottið, og at tað fór ikki at verða lagt framaftur.

Løgtingsumsitingin og løgfrøðingar hava víst á, at løgtingið ikki eigur at viðgera uppskotið, tí tað er í stríð bæði við grundlóg, heimastýrislóg og stýrisskipanarlóg.

Hóast tingfólk eru viknað í kongunum, so er kortini at vóna, at tey finna eina skilagóða semju í hesum máli. Tað ber ikki til, at vit fella aftur í gomlu grøvina hjá Tjóðveldi og Sambandi, har als eingin dialogur er.

Tað er ov býtt, um komandi ættarlið skulu verða vitni til eins tápuligt kjak, sum vit seinastu mansaldrarnar hava havt um eina ósera greiða og fløkta fólkatkvøðu í 1946.

Eitt er vist. Føroyingar vilja ikki hava loysing, og føroyingar vilja heldur ikki aftur í amtstíðina. Tí er loysnin harímillum. Tað er utopiskt at ímynda sær, at Føroyar koma aftur í eina amtslíknandi støðu ella verða ein fult integreraður partur av Danmark. Tá fullveldi samstundis er so fjart, so er tað bara skyldan hjá okkara fólkavaldu at gera eina skipan, sum er harímillum. Her er stjórnarskipanaruppskotið ein gyltur møguleiki.

Men Hans Pauli Strøm hevur grein í sínum máli, at um ikki allir flokkar samtykkja nýggju skipanina, so kann tað gera tað sama.

Í so máta hava vit ikki góðar royndir av føroyskum politikarum.



Kjakið um ríkisrættarligu støðuna hevur ikki verið sakligt seinastu øldina - kanska heldur beinleiðis fordummandi. Síðstu árini eru tó munandi framstig hend, har bæði Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava flutt seg. Tað er tað, sum er politikkur - at flyta seg.

Tað ber til at gera eina stjórnarskipan, sum hóskar øllum flokkum. Ein stjórnarskipan skal ikki verða ein avgerð um fullveldi - ella um at binda føroysku tjóðina í danska ríkinum.

Tað er avbjóðingin hjá løgtinginum at finna hesa tjóðarsemjuna, sum verður grundarlagið undir førohyska fólkaræðinum.

## » Eitt fordummandi kjak

# Býarstýrið sum hatar bilar



*Her hvørvur møguleikin hjá í minsta lagi 45 fólkum at parkera*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Er tað nakað, sum fólk, ið hava sína dagligu gongd í miðbýnum í Havn sakna, so eru tað parkeringspláss.

Herfyri skrivaðu vit um, at kommunan hevur beint burtur sjey parkeringsbásar á Kongabrúnni. Umberingin var, at drotningin skuldi spáka framvið, og tí at nakrir arbeiðsmenn ikki fingu arbeitt fyri bilum.

Drotningin gekk ikki fram við Kongabrúnni, og eingir arbeiðsmenn hava arbeitt har heldur. Borgarstjórin lovaði, at parkeringsbásirnir skuldu koma aftur, men enn eru eingir básar.

Á hesum sjey básum kunnu fólk parkera í minsta lagi 126 ferðir um dagin. Ella 126 fólk, sum havi ørindi í grannalagnum, kundu parkera har í hálvan tíma.

Nú er túrurin komin til Tórsgøtu. Har hevur býráðið hesa vikuna beint burtur fimm básar, har bilar kundu standa í ein tíma. Har kundu 45 fólk parkera í í mesta lagi ein tíma um dagin, og soleiðis kundu hesi í minsta lagi 45 fólkini avgreitt síni ørindi.

Fyrr hevur kommunan eisini beint burtur einar 20 básar undir Bryggjubakka, har sum í minsta lagi 180 fólk kundu parkerað í ein tíma um dagin.

*Vit skilja ikki hendan politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Eitt býarstýri, sum ikki vil, at almenningurin kann parkera í miðbýnum skilir ikki sína uppgávu. Og tá tey samstundis merkja upp básar á almennum veg til bilar hjá kommununi, so skilja vit tað slett ikki. Hví skulu bara starvsfólk hjá býráðnum parkera í miðbýnum?*

*Vit vætna okkum eina frágreiðing frá Marin Katrinu Frýdal, sum er forkvinna í teknisku nevnd og soleiðis varðar av hesum margháttliga parkeringspolitikki...*



## » Eitt vet av sannføri gagnar

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 26



## » Fólkapensjónsránið

ASBJØRN LÓMAKLETT
KJAK Á SÍÐU 27




# Nýtt ókeypis blað

Mánadagin verður eitt nýtt ókeypis blað borið í hvørt hús í landinum.

Tað er Sosialurin, sum gevur hetta nýggja blaðið út - nevnt Mánaðarblaðið.

Endamálið er sjálvandi at røkka út til hvørt húski landinum í minsta lagi eina ferð um mánaðin.

Talan er um eitt blað, sum umframt lýsingar- og kunningartilfar eisini hevur heimlig og útlendsk smátíðindi. Tosað verður við kendar føroyingar, har eru tips um nýggjar bøkur, fløgur og filmar, leiðbeiningar um vín til matin og høvið, har tilfar um móta, um bilar og um fyritøkur.

Við mánaðarblaðnum hevur Miðlahúsið í Vágsbotni enn ein miðlapall til sítt virksemi. Nú hevur Miðlahúsið dagblaðið Sosialin, Rás2, tíðindini á Portalinum og eitt ókeypis blað í hvørt hús.

- Hetta er fyri at kunna nøkta allan tørv hjá lýsarum og lesarum, sigur Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo